# bygd



*Fámjin fekk heiðurin sum "Best røkta bygd í 2010". Lesi í hesi greinini um aðrar virðislønir, sum eisini vórðu lætnar á samkomu í Preluni í gjár Mynd: Jens Kristian Vang*

myndarligur og eitt gott dømi um, hvussu slíkir stovnar kunnu skipast.

### Besta átak

Tinghúsið og endurnýtsluhøllin hjá Dugna á Kambsdali gjørdist vinnari av »Besta átaki«.

- Henda virðislønin verður latin fyri framskygt átak, ið fremur grøna tilvitan og nýhugsan, og sum virkar positivt í mun til náttúru- og umhvørvisvernd, burðardygga menning og/ella burðardygga ferðavinnu.

Metingarnevndin gjørdi av at lata Dugna heiðurin fyri, tí stovnurin bæði hugsar um at nýta minni og serstakt um at bøta um og seta í stand brúktar lutir, ið kunnu seljast aftur fyri lítla upphædd og soleiðis kunnu endurnýtast.

- Endurnýtslufyribrigdið er ikki ókent, men meta vit tó, at stovnurin eisini við sínum starvsfólkapolitikki hevur rós uppiborið og at verða kosin Besta átak 2010, sigur metingarnevndin.

vilmund@sosialurin.fo



*Rættindini hjá flakatrolarunum í Barentshavinum verða hótt, um Føroyar fara at áseta sær eginkvotu av makreli fyri 2010. Myndin er av Ennibergi*

# Feløg í tvístøðu

**MAKRELUR - Landsstýrismaðurin er mitt í eini prosess, og eg vil ikki órógva royndir hansara at fáa ein størri part av makrelkvotuni, sigur Anfinn Olsen, reiðari, ið bæði hevur skip, sum fiska í Barentshavinum og skip, sum fiska makrel og hava áhuga í einum betri býti**

Vilmund Jacobsen

Tað eru serliga tvey føroysk reiðarí, sum bæði hava áhugamál í norskum sjógvi í Barentshavinum, samstundis sum tey hava áhuga í eini størri mekrelkvotu. Hesi feløg eru JFK Trol hjá Hanusi Hansen í Klaksvík og Framherji hjá Anfinni Olsen á Toftum.

Trupulleikin hjá hesum feløgum er, at við eini møguligari áseting av eginkvotu av makreli í føroyskum sjógvi fyri 2010, er vandi fyri, at Noreg ikki vil gera sáttmála við Føroyar um toskakvotu í norskum sjógvi í Barentshavinum.

Ein føroysk eginkvota av makreli fer helst eisini at fáa ta avleiðing, at ES tekur føroysku rækjukvotuna í Eysturgrønlandi aftur, soleiðis at tey rækjuskip, ið eftir eru, ikki sleppa at fiska rækjur í Grønlandi, um Føroyar áseta sær eginkvotu av makreli.

### Avgerðin bíðar

Enn veit eingin, hvør endaliga avgerðin hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Jacobi Vestergaard, verður. Greitt er tó, at á seinasta fundi millum strandalondini, sum varða av makrelinum, vildu Føroyar ikki góðtaka bert at fáa sløk 5% av samlaðu makrelkvotuni, meðan Noreg og ES kannaðu sær alla restina.

Í løtuni er politiska samráðingarumfarið í gongd, har landsstýrismaðurin hevur havt fundir við íslendska og norska fiskimálaráðharran. Enn hevur eingin fundur verið við fiskivinnukommiserin í ES, men samband er millum partarnar, og hugsandi er, at ein síkur fundur kann verða í fyrstu viku av juli mánaði.

Tað var eftir ein fund millum uttanlandsnevndina hjá løgtinginum og landsstýrismannin í fiskivinnumálum, at partarnir samdust um at taka málið um býtið av felagskvotuni av makreli upp á politiskt stig.

Jacob Vestergaard hevur sagt, at hann fer ikki at taka nakra endaliga avgerð um kvotuna, fyrr enn politiska fundarumfarið er liðugt.

Tað er tó fáur sum væntar, at hetta fundarumfar fer at broyta býtið av felagskvotuni.

### Einki órógv

Anfinn Olsen, reiðari hjá Framherja, sum eigur flakatrolaran Vesturvón og pelagiska skipið Fragraberg, ásannar, at felgið hjá teimum hevur áhugamál, bæði í norskum sjógvi í Barentshavinum og í einum frægari býti av felagskvotuni av makreli.

- Vit eru samd við landsstýrismanninum í fiskivinnumálum um, at okkara partur av makrelkvotuni er ov lítil í mun til parting, sum Noreg og ES kanna sær í avtaluni, sum verið hevur millum hesi trý strandalondini.

Hann ásannar tó, at




*Anfinn Olsen er annar føroyski reiðarin, sum hevur áhugamál í norskum sjógvi í Barentshavinum, samstundis sum hann hevur áhuga í einum størri parti av føroysku makrelkvotuni*

tað kann taka tíð at flyta prosentini í einum slíkum býti.

- Vit halda eisini, at føroyski parturin er ov lítil. Hinvegin mugu vit eisini hugsa um møguleikarnar, sum ein semja gevur við makrelveiði í norskum og ES-sjógvi, tá meiri fæst fyri fiskin.

Anfinn Olsen heldur eisini, at neyðugt er at gera sær eina heildarmeting, tá avgerðin verður tikin um, hvussu fram skal farast.

- Vit noyðast at taka øll viðurskifti við í metingunum – bæði, hvat vit koma at fáa, og hvat vit hugsandi koma at missa.

Spurdur, um hann hevur nøkur ráð at geva landsstýrismanninum, nú hesin er í holt við politiskt fundarumfar við fiskimálaráðharrarnar í Íslandi, Noreg og ES, sigur Anfinn Olsen, at tað hevur hann ikki.

- Landsstýrismaðurin er mitt í eini prosess, og eg vil ikki órógva royndir hansara at fáa ein størri part av makrelkvotuni, sigur reiðarin á flakatrolaranum Vesturvón og pelagiska skipinum, Fagrabergi.

vilmund@sosialurin.fo


## Aðalfundur

Bátafelagið á Toftum heldur aðalfund 28. juni kl. 19.00 í hølunum hjá Tofta Arbeiðsmannafelag.

Skrá samb. lógum felagsins.

***Bátafelagið á Toftum***